# at leggja skúlar niður



*Næmingarnir í Mikladals skúla sita so hugagóðir í hugnaliga bygdarskúlanum ein vanligan dag í 2005. Spurningurin er, hvussu leingi tey sleppa hetta aftrat. Tað kann meiri enn so henda, at tey mugu fara í annan skúla at ganga*

*Savnsmynd: Jens Kristian Vang*

ingum og hin í Kunoy við fimm næmingum. Millum bygdirnar er ein góður og breiður tunnil, og tí er í roynd og veru eingin forðing fyri at næmingarnir kunnu verða fluttir í ein og sama skúla.

Landsstýriskvinnan hevur somuleiðis verið frammi og sagt, at niðurlegging av skúlum kann merkja umskipan av skúlanum, soleiðis at annað skúlavirksemi enn tað sum er nú, verður í skúlunum.

Verða broytingarnar framdar, soleiðis sum landsstýriskvinnan leggur upp til, fer fitt av pengum at verða leysgivið. Men hvussu kunnu vit tryggja okkum, at hesir pengar verða verandi í skúlaskipaninum og ikki verða brúktir til annað?

Í viðmerkingunum til uppskotið verður sagt, at pengarnir kunnu m.a. verða brúktir til námsfrøðiligar uppgávur sum økta tvílæraraskipan í byrjanarundirvísingini, skipan og menning av lesivegleiðara- og serlæraraørráðgeving, fjøltáttaða eftirútbúgving, fleiri NSR-tænastur og annað.

- Soleiðis sum fíggjarútlitini eru í dag, kunnu vit ikki rokna við, at fólkaskúlin næstu nógvu árini fær størri játtan at ráða yvir. Tískil skal játtanin til tað ymiska, ið ætlanin er at fara undir, finnast innan verandi karmar, slær Olaus Jespersen fast.

## Ganga saman í skúlasambond

Verður uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan samtykt, fær landsstýriskvinnan heimild at fara undir samráðingar við kommunur um at ganga saman í skúlasambond.

Hesi skulu so heilt ella lutvíst skipa síni viðurskifti í felags skúlaøki, sum samsvara við tær eindir, sum ásettar eru í løgtingslógini frá februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.

Um so er, at kommunurnar í skúlaøkinum ikki semjast um eina avtalu um skúlasamstarv í seinasta lagi 1. januar 2011, ásetur landsstýrisfólkið við virknaði frá 1. august 2011 í hvørjum skúlum í økinum, undirvísing skal verða. Reglurnar um fólkaatkvøðu í sambandi við, at kommunalur skúli verður lagdur niður, verða sostatt avtiknar.





## Val av limum til Umboðsráðið fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

**Í februar mánaði ár 2010 skulu 12 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

**Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna í Tórshavn innan **1. februar 2010.**

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi. Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni á Kongabrúnni ella á trygging.fo.

Kongabrúgvin • Postsmoga 329 • 110 Tórshavn • Tel 345 600 • Fax 345 601 • tf@trygging.fo • www.trygging.fo

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA